# Mimirs táttur

Mimir tykir ongan sín líka,
– *ærligu menn* –
hann fór sær til Tjørnuvíkar,
*ikki er dagur enn,*
*orlov biðum vær.*

2. Inn kemur malan, konan blíð:
“Her kemur ein maður sunnan líð.

3. Stoyt ikki burtur høvdasoð,
eg meini, hann hevur grindaboð.”

4. Mimir tekur av sær hettu:
“Eg eri komin at keypa kettu.”

5. Mimir tekur av sær hatt:
“Eg eri komin at keypa katt.”

6. Hálvdan situr og knýtir neva:
“Hvat vilt tú fyri kattin geva?”

7. “Er hann svartur ella hvítur,
sig mær, um hann klórar ella bítur?”

8. Svaraði Kristin, í koyggjuni ríkir:
“Katturin hvørki klórar ella bítur.”

9. Mimir tekur so høgt at skrála:
“Eg gevi fyri kattin ein slættan dála.”

10. Seyðarhøvd fekk hann at eta,
svartan katt fekk hann at bera.

11. Hart hann tyggir, títt hann svølgir,
kjálkjarnir eru sum smiðjubjølgir.

12. Mimir gongur sær út á oyrar,
svartan katt í barmin koyrir.

13. Tá ið hann kom á ennið,
tá hugdi hann at henni.

14. Tá kom hann á Skorarheyg:
“Eg meini, hann ber ein svartan seyð.”

15. Tá hann kom á Fjøruglyvur,
tá hevði hon klórað seg inn á livur.

16. Tá hann kom á Marmaskall’á,
tá hekk síðan niðurfrá.

17. Tá hann kom har suður í líð:
“Tygara eygur eru blíð.”

18. Mimir upp í ættina rýtur,
katturin fullan barmin drýtur.

19. Tá hann kom á øskudunga,
tá var klórað inn á lungað.

20. Tá ið hann kom á Heyggin svarta,
tá var klórað inn á hjartað.

21. Tá ið hann kom á Víkarheyg,
tá var hann í tí størstu neyð.

22. Mimir stígur inn um gátt:
“Av hesum katti fái eg tátt.”

Tættir II hjá M. Johannesen, men onkur ørindir úr uppskrift hjá Kathrinu Hansen, Norðskála.